

# Suðuroyingar yvirtaka Manhattan

**Fríggjakvøldið og leygarkvøldið kunnu fólk syngja við í Manhattan, tá væl umtóktu Eyðun og Neil framføra**

TÍÐINDASKRIV

Teir plaga at fáa lív í staðið, suðuroyingarnir báðir. Og um vikuskiftið gera teir enn eina roynd. Bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið spæla Eyðun og Neil nevniliga í Manhattan. Tey, ið ynskja sukursøt kærleiksløg, mugu sostatt fara onkra aðrastaðni, tí tað plagar at vera plúmm í, tá Neil við kassagittaranum og Eyðun við tí høgu røddini undirhalda. Og skráin plagar eisini at vera rættiliga umfevnandi. Alt frá góðum gomlum enskum slagarum til tryggar veitslusangir úr Grønu Sangbók.

*Eyðun Ásason og Neil Joensen borga altíð fyri einum festligum kvøldi*



*Eager 2 Please hava seinastu tíðina arbeitt við fyrstu fløguni hjá bólkinum, leygarkvøldið fáa vit smakksroynd av henni*
*mynd: nud*

# Nýskrivaður føroyskur tónleikur í REX

**Um vikuskiftið verða bæði útgávukonsert og smaksroynd av einari enn ikki lidnari útgávu at hoyra í Rex, tá Krisleif Zachariassen og Eager 2 Please fara at spæla.**

TÍÐINDASKRIV

Bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið verður livandi tónleikur í dansistaðnum Rex. Kristleif Zachariasen leggur út fríggjakvøldið frá kl. 21 til 23, og kvøldið eftir spælir føroyski rokkbólkurin Eager 2 Please. Bæði kvøldini fáa áhoyrarar sostatt møguleika at hoyra nýtt tilfar. Kristleif Zachariasen er fløguaktuellur, meðan Eager 2 Please fer at geva eina smaksroynd av tí, sum føroyski rokkbólkurin væntandi gevur út seinni í ár.

Eager 2 Please hevur annars seinastu mánaðirnar tikið sær stundir til at upptaka sína fyrstu fløgu. Upptøkurnar, sum bólkurin ger saman við ljóðmanninum og framleiðaranum Jón McBirnie, sigast at vera komnar væl áleiðis.

Tey, ið annars ikki hava møguleikan at hoyra Kristleif Zachariasen fríggjakvøldið í Rex, fáa enn ein tjans seinni um kvøldið. Trubadururin við eyðkenda fullskegginum heldur nevniliga fram undirhalda niðrir í Café Natúr, tá hann einaferð er liðugur at spæla í Rex og hevur latið skansan yvir til plátuvendaran DJ Ottar.

# Deja Vu í Café Natúr

Deja Vu fer aftur á pall í Havn hetta vikuskiftið. Bólkurin, ið er í uppskotið til heiðurslønina sum besti bólkur á Planet Awards, leggur fyri í kvøld.

Sveimandi rokktónarnir hjá GBOB vinnaranum hava givið bólkinum fjepparar um allar Føroyar, og eisini uttanlands tykist áhugin at vera vaksandi fyri Deja Vu. Á GBOB finaluni í London fekk bólkurin nýggjar fjepparar úr m.a. Hvíta Russlandi og úr Danmark. Fløgan A Place To Stand On hevur vakt áhugan fyri Deja Vu hjá nógvum fólki. M.a. var Jesper Binzer úr D:A:D bergtikin av tónleikinum hjá bólkinum, tá hann vitjaði í Føroyum á Planet Awards í fjør.

Deja Vu spælir í Café Natúr í kvøld, hóskvøldið og leygarkvøldið. Fríggjakvøldið er tað Kristleif Zachariassen, ið undirheldur á Café Natúr. Kristleif hevur júst givið fløguna On The Road út, og verður ivaleyst høvi at hoyra tónleik av henni hetta kvøldið.

*nud*



*Deja Vu eru millum uppskotini til besta bólk á Planet Awards, hetta vikuskiftið spæla teir í Café Natúr*
*mynd: nud*

## Rætting til grein á s.2 í Sosialinum mikudagin 17. januar

Í Sosialinum í gjárkvøldið vóru nøkur av nøvnunum, ið spæla á Planet Awards avdúkaði. Av misgáum var eitt navn komið skeivt fyri, The Dreams fáa tíanverri ikki lutttikið. Tað er rætt at sum skriva er, at 200 og Páll Finnur Páll spæla, men hóast bæði fyrireikarar og The Dreams høvdu ynskt, at bólkurin kom á pall hetta kvøldið, er bólkurin frammanundan upptikin við onkrum øðrum. Ein misskiljing millum blaðmannin og fyriskipararnar hevur tó havt við sær, at bólkurin er nevndur í greinini Hetta biðja vit lesaran um at umbera okkum. Men samstundis kunnu vit gleða tykkum við, at 200, Páll Finnur Páll og Bryan Rice umframt fleiri onnur spennandi nøvn fara á pall. *nud*